FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Ársfrágreiðing

# 2013

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

J. C. Svabos gøta 14 • Box 272
110 Tórshavn • Faroe Islands • www.setur.fo

# Innihaldsyvirlit

**Fróðskaparsetur Føroya 2013** .......... 2

**Fyrisitingin** .......... 4

**Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi** .......... 6

**Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi** .......... 8

**Útbúgvingar og lesandi** .......... 10

**Fíggjarviðurskifti** .......... 12

**Leiðsla og stýri** .......... 13

**Vísindaligar útgávur** .......... 14

*Javnlíkamettar (Peer reviewed)* .......... *14*

*Ráðstevnur (Conferences)* .......... *16*

*Aðrar vísindaligar útgávur (Other scientific publications)* .......... *18*

*Ritstjórnararbeiði* .......... *19*

*Fyriskipan* .......... *19*

**Ph.d. verkætlanir** .......... 21

# Fróðskaparsetur Føroya 2013

## *Bygnaðarbroytingar*

Fróðskaparsetrið verksetti í 2012 fyrsta stigið í eini bygnaðarbroyting, har tær fimm deildirnar vórðu skipaðar í tvær megindeildir við hvør sínum dekani. Hans Pauli Joensen varð settur dekanur á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi og Malan Marnersdóttir varð sett dekanur á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi.

Í eini skiftisskipan varð avrátt, at deildarleiðslan skuldi halda fram, meðan dekanstarvið varð verksett og aðrar broytingar fyrireikaðar.

At avloysa deildarleiðsluskipanina varð sett í verk skipan við útbúgvingarleiðslu og lestrarráði. Hendan skipan er vælkend frá øðrum universitetum og viðførir, at útbúgvingarleiðari verður settur fyri hvørja útbúgving. Útbúgvingarleiðarin hevur ábyrgd av eini røð av viðurskiftum, ið eru týdningarmikil fyri, at útbúgvingarnar kunnu avrikast á tryggan og skipaðan hátt. Útbúgvingarleiðarar vísa til dekanarnar.

Til at styrkja arbeiðið at halda og menna dygdargóðar útbúgvingar er ynskiligt at seta á stovn lestrarráð fyri hvørja deild. Á størri universitetum er vanligt, at hvør útbúgving hevur sítt lestrarráð, men fyri Fróðskaparsetrið varð gjørt av, at lestrarráðini í fyrstu atløgu verða sett á hvørji deild. Lestrarráðini eru samansett av umboðum fyri vísindastarvsfólk og fyri lesandi. Dekanurin tekur stig til setan av lestrarráðum.

## *Kunningartøkni*

Í desember 2012 varð avgerð tikin um at flyta partar av telduskipanum Setursins í hýsing. Avtala varð gjørd við Føroya Tele og varð fyrsti partur av hesi flyting framd beint fyri ársskiftið 2012/13. Gjøgnum 2013 fingust royndir av nýggju skipanini og aðrir partar av flytingini vórðu so við og við framdir, soleiðis at hýsingin nú fevnir um postskipan, fílugoymslu, aðrar fakskipanir og trygdaravrit. Flytingin merkir, at Setrið rindar ein fastan prís fyri rakstur av hýsingumhvørvinum og at íløgur í telduútgerð minkar munandi. Broytingin hevur eisini við sær, at KT-starvsfólk í størri mun kunna hugsavna seg um uppgávuna at veita starvsfólkum KT-hjálp.

## *Setrið eftirmett*

Fróðskaparsetur Føroya verður nú eftirmett av uttanhýsis serfrøðinganevnd, sum Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í mentamálum, hevur sett. Í lógini um Fróðskaparsetur Føroya er ásett, at landsstýrismaðurin skal skipa fyri eftirmeting av Fróðskaparsetri Føroya, og at uttanhýsis serfrøði skal gera eftirmetingina. Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at ein slík uttanhýsis eftirmeting verður gjørd. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við leiðsluna á Fróðskaparsetrinum. Tey, ið mannað serfrøðinganevndina eru Linda Nielsen, forkvinna,

Dr.jur., Københavns Universitet, Juerg Glauser, professari, University of Zurich og Jón Torfi Jónasson, ph.d., Háskóli Íslands.

Serfrøðingarnir skulu meta um virksemið á Fróðskaparsetrinum í síni heild við serligum denti á útbúgving. Tey fáa fríar teymar at meta um øki, ið tey sjálv halda hava týdning fyri ein útbúgvingar- og granskingarstovn, sum skal virka á altjóða støði. Frágreiðingin frá eftirmetingarnevndini verður eftir ætlan latin MMR á heysti 2014.

## *Strategi og avrikssáttmáli*

Við ársbyrjan 2013 varð gongd sett á arbeiðið at orða eina yvirskipaða strategi fyri Fróðskaparsetrið. Arbeiðsbólkurin varð mannaður við ráðgeva, deildarleiðarum, dekanum, fyrisitingarstjóra og rektara. Fundir vórðu hildnir regluliga gjøgnum árið og skipað varð fyri felags kunningarfundum fyri øllum starvsfólkum á Setrinum.

Í 2012 varð stig tikið til at orða avrikssáttmála millum leiðslu og stýri. Uppskotið varð viðgjørt á stýrisfundum og í ymiskum fora á Setrinum, og 1. november 2013 varð avrikssáttmálin fyri Fróðskaparsetur Føroya staðfestur av stýrisformanni og rektara. Sáttmálin sæst á heimasíðu Setursins.

## *Samstarvsavtala við Háskóla Íslands*

Fróðskaparsetur Føroya undirritaði í 2009 samstarvssáttmála við Háskóla Íslands. Sáttmálin ásetir yvirskipaði viðurskifti og leggur dent á umskifti av lesandi og starvsfólkum. Tann 13. mai 2013 varð fyrsta fylgiskjalið til sáttmálan frá 2009 undirritað. Í fylgiskjalinum eru samstarvsøki meiri nágreiniliga ásett. Sáttmálaskjølini síggjast á heimasíðu Setursins.

*Sigurð í Jákupsstovu,*

*rektari*

# Fyrisitingin

## *Euraxess*

EURAXESS-portalurin, www.euraxess.fo, er partur av nýggju EURAXESS-tænastuni í Føroyum, sum Granskingarráðið, í samstarvi við Fróðskaparsetrið, er farið at byggja upp. Tænastan skal gera tað lættari fyri granskarar at flyta millum lond at arbeiða, við at upplýsa um m.a. um skattaviðurskifti, uppihaldsloyvi og onnur praktisk viðurskifti, sum granskarar hava tørv á vitan um í samband við eitt tílíkt skifti.

Føroyska tænastan verður partur av netverki við umleið 200 sentrum í 38 londum. Ein týdningarmikil partur er EURAXESS Jobs, har til ber at finna leys størv, sum granskingarstovnar og virkir í Evropa lýsa við.

## *Charter and Code*

"European Charter for Researchers and Code of Conduct for the Recruitment of Researchers", stytt Charter and Code, er eitt skjal í tveimum pørtum við tilmælum um rættindi og skyldur hjá granskarum, arbeiðsgevarum og stuðulsveitarum viðvíkjandi m.a. setanartreytum, arbeiðsumstøðum og yrkisvegleiðing. Endamálið við Charter and Code er at varpa ljós á og bøta um starvstreytir og yrkismøguleikar hjá granskarum.

Tá granskingarstovnar og stuðulsstovnar boða frá, at teir taka undir við Charter and Code og ætla at fylgja ásetingunum, verður stovnurin settur á eitt yvirlit á EURAXESS Rights heimasíðuni, sum granskarar og vísindafólk vitja, tá tey flyta ímillum lond. Arbeiðið við at fáa Setrið á hendan listan er í gongd.

## *Fíggjarøkið miðsavnað*

Í 2013 varð avgjørt at savna alt fíggjarøkið á Setrinum undir Fíggjardeildina fyri at tryggja eina enn effektivari fíggjarumsiting og skapa størri gjøgnumskygni á fíggjarøkinum. Hetta fer at styrkja hagtalsgrundarlagið, soleiðis at til ber at lýsa virkisøkini, sum Fróðskaparsetur Føroya varðar av, mótvegis dekanum, rektara, stýri, Mentamálaráðnum, Landsgrannskoðaranum o.ø.

Miðsavnan av fíggjarøkinum í eitt fakligt umhvørvi fer at styrkja um góðskuna av ráðgevingini innan fíggjar- og starvsfólkaøkið, eins og tað fer at stuðla undir eina munagóða fíggjarstýring í mun til fíggjarætlan. Ein avleiðing av at miðsavna fíggjarøki er, at ressursir á deildunum verða frígivnar og tí kunnu brúkast til aðrar uppgávur.

## *Nýggj journalskipan*

Fróðskaparsetrið hevur keypt journalskipanina 360° frá Formula. Journalskipanin er eina sokallað Enterprise Content Management (ECM) skipan, sum flestu almennir stovnar í

Føroyum brúka. Journallykilin er dagførdur, soleiðis at hesin passar til nýggju skipanina og nýggja bygnaðin á Setrinum.

## *Felags prógvhandan*

Fyri fyrstu ferð síðani Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Læraraskúli og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin vórðu løgd saman við lóg í 2008, varð skipað fyri felags prógvhandan. Prógvhandanin fór fram 21. juni í auluni á Námsvísindadeildini. Tey, sum fingu prógv, vóru bachelorar í søgu, stjórnmálafrøði, samfelagsvísindum, námsfrøðingar og lærarar.

## *Ráð teirra lesandi stovnað*

Ein arbeiðsbólkur við 5 lesandi á Setrinum hevur í vár orðað reglugerð fyri Ráð teirra lesandi. Reglugerðin varð undirskrivað av rektaranum og umboð fyri tey lesandi tann 21. juni í ár. Skipað varð fyri vali til Ráð teirra lesandi í oktober. Ráðið skal umboða øll lesandi á Fróðskaparsetrinum og røkja áhugamál teirra lesandi í samstarvi við leiðslu, undirvísarar og onnur starvsfólk.

## *Bologna tilgongdin*

Stór verkstova var um bolognaskipanina, sum Setrið leggur allar útbúgvingar, skeiðslýsingar o.a. til rættis eftir. Annar verkstovuleiðarin var Arlene Gilpin, professari og altjóða ráðgevi innan undirvísing og læring á universitetum og eksternur metari um allan heim fyri The UK QualityAssurance Agency. Hin verkstovuleiðarin var Anne Serbate, sum er ph.d. og starvast á universitetinum í Padova, Italia. Verkstovur vóru á øllum fimm deildum og alt tiltakið var partur av Tuning skipanini, sum er evropeisk verkætlan knýtt at bolognatilgongdini. Serfrøðingarnir gjøgnumgingu profilar og skeiðslýsingar fyri útbúgvingarnar. Annar av serfrøðingunum hevur fyrr vitjað Setrið og frøddist yvir framgongdina, hóast nakað er eftir á mál. Eitt nú at samskipa læruúrtøkurnar í profilunum og skeiðslýsingunum – og knýta tær at próvdømingini. Góð ráð og vegleiðing eru í frágreiðingini, sum hon gav deildunum eftir vitjanina.

# Megindeildin fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi

## *Útbúgving*

Undirvísing og gransking, ið eru høvuðsuppgávurnar hjá megindeildini, mentust við fleiri tiltøkum í 2013.

Á Søgu- og samfelagsdeildini er talið á lesandi stórt, nógv søkja um upptøku, ið váttar at útbúgvingarnar eru væl umtóktar. Samfelagsligu bachelorútbúgvingarnar vórðu góðkendar sum upptøkugevandi til sjey ymiskar útbúgvingar á Roskilde Universitet.

Á fyrsta sinni byrjaði masternám í løgfrøði á Setrinum. Hetta tveyáranámið er skipað sum fulltíðarlestur og ætlanin er at taka upp á hvørjum ári. Útbúgvin við masterprógvi í lóg frá Fróðskaparsetrinum kunna taka við størvum í almennari og privatari fyrisiting, har kravið er løgfrøði ella samsvarandi hægri útbúgving. Harafturat kunnu løgfrøðingar við hesum masternámi og almennum bachelorprógvi í løgfrøði útbúgva seg víðari til advokatar og dómarar.

Í 2013 byrjaði undirvísing fyri útlendingar á Føroyamálsdeildini. Skeiðið varð skipað sum blendislæring, har partur hevur verið skipaður sum undirvísing á staðnum og partur av undirvísingini hevur verið yvir netið. Deildin skipaði eisini fyri Nordkurs-summarskeiði í føroyskum máli fyri norðurlendsk lesandi. 23 studentar úr øllum Norðurlondum vóru við.

Arbeiðið at talgilda søvnini á Føroyamálsdeildini og gera tey alment atkomilig helt fram og í ár kom arbeiðið við at skanna inn orðaseðlar á mál.

Hjánám í føroyskum varð í 2013 skipað av nýggjum. Hjánám gevur undirvísingarførleika saman við høvuðsnámi í aðrari lærugrein.

Námsvísindadeildin bjóðaði hetta heystið út eina nýggja kreativa breyt. Kreativa breytin skal menna tað skapandi í øllum lærugreinum og umfatar handverk og list. Á henda hátt gav Fróðskaparsetrið sítt íkast til at menna tær skapandi lærugreinirnar í fólkaskúlanum, sum víst varð á í frágreiðingini "List í uppvøkstri og skúlagongd í Føroyum" eftir Anne Bamford, sum Mentamálaráðið gav út í november 2012.

Námsvísindadeildin fekk vitjan av Mikael Aleksandersson, professara í námsfrøði og didaktikki og rektara á Högskolen i Halmstad, Svøríki. Hann helt áhugaverdan fyrilestur um læraraútbúgvingina í globalari frásjón undir yvirskriftini "Professionsutbildningens dilemma", sum er tvístøðan millum kravið um at læra til eitt ávíst yrki og at vera vísindaliga grundað.

## *Samstarv*

Samráðingar millum Fróðskaparsetrið og Fólkakirkjuna um eitt granskingar- og undirvísingarstarv í kirkjusøgu byrjaðu, tá ið reglugerð fyri sóknarprestaembætini varð sett í gildi. Har er ásett, at fyri at fáa fast starv sum prestur í Føroyum, skulu prestarnir hava lokið lært nám í føroyskari kirkjusøgu, kirkjusiðum, v.m.

Tann 24.-25. august var Føroyamálsdeildin vertur fyri áttanda Frændafundinum, sum er ráðstevnan hjá samstarvinum millum Fróðskaparsetrið og Háskóla Íslands. Høvuðsevnini vóru móðurmál, móðurmálsundirvísing og filmur. Hetta samstarvið millum Fróðskaparsetur Føroya og Háskóla Íslands gevur granskarum høvi til at halda fyrilestrar og skifta orð um sína gransking viðvíkjandi føroyskum og íslendskum evnum og gevur øðrum høvi til at hoyra fyrilestrarnar og orðaskiftið. Frændafundarsamstarvið byrjaði í 1990, og ráðstevnur hava verið triðja hvørt ár.

Fyrsta útbúgvingin í Føroyum í vegleiðing byrjaði á heysti 2013 á Námsvísindadeildini. Talan er um masternám í vegleiðing og starvsleiðbeining. Útbúgvingin fekk beinanvegin stóra undirtøku – 49 skikkaðir umsøkjarar vóru, av teimum byrjaðu 43 lesturin. Masternámið er fingið í lag í samstarvi við Háskóla Íslands og Mentamálaráðið. Til at standa fyri útbúgvingini varð Sif Einarsdóttir, ph.d. og dosentur á Háskóla Íslands, knýtt at Setrinum sum adjungeraður lektari. Undirvísarar eru frá Setrinum, Háskóla Íslands og øðrum norðurlendskum universitetum. Útbúgvingin er samansett av fjarlestri og vikuskiftisundirvísing, og hon er skipað sum parttíðarlestur soleiðis, at tað tekur fýra ár at taka hetta tveyáranám. Mentamálaráðið fíggjar undirvísingina, sum kemur uttaneftir, og Setrið ber kostnaðin av tí adjungeraða lektaranum, aðrari undirvísing, høli, ráðlegging, fyrisiting v.m. Norðplusnetverkið VALA er samstarvsfelagi í útbúgvingini.

## Megindeildin fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi

### *Útbúgving*

Arbeitt varð í 2013 framhaldandi við at skipa allar útbúgvingar eftir Bologna leistinum, og miðað verður eftir at koma á mál í 2014.

Ískoytisútbúgving til bachelor í sjúkrarøktarfrøði varð aftur boðin út í 2013. Endamálið við útbúgvingini er at geva sjúkrarøktarfrøðingum, ið eru útbúnir eftir eldri skipanum, møguleika til at uppstiga eldru útbúgvingina til bachelor, og at geva heilsustarvsfólki við aðrari heilsufakligari miðallangari framhaldsútbúgving akademiska ískoytisútbúgving á bachelorstigi. Arbeitt hevur verið við at fyrireika eina nýggja masterútbúgving í heilsuvísindum. Miðað verður eftir at hava eitt uppskot til innihald í útbúgvingini tíðliga í 2014.

Í øllum útbúgvingunum á Náttúruvísindadeildini er dentur lagdur á flytføri, soleiðis at tey lesandi eftir lokna útbúgving m.a. skulu kunna halda fram til kandidatútbúgvingar á øðrum universitetum. Góðar royndir eru við hesum. Útbúgvingin í KT-verkfrøði samstarvar við Mittuniversitetet í Svøríki, so at lesandi í KT-verkfrøði kunnu taka skeið har sum fjarlestur, ið er partur av útbúgvingini á Setrinum. Ein munandi partur av undirvísingini fer fram við hesum fjarlestrarmøguleika.

Seinasta árið hevur verið arbeitt við at nýskipa lívfrøðiútbúgvingina. Ein arbeiðsbólkur varð settur, ið skuldi gera uppskot til skipan við ymiskum fakprofilum, men har ávís fak vórðu felags  fyri ymisku profilarnar. Arbeiðsbólkurin lat frágreiðing úr hondum tann 13. desember 2013. Frágreiðingin er tøk á alnótini undir heitinum “Uppskot til endurskoðan av BSc-útbúgvingini í lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya”. Ætlanin er, at lívfrøðiútbúgvingin skal bjóðast út eftir nýskipaðum leisti í 2014.

Orku- og umhvørvisverkfrøði er nýggj útbúgving á bachelorstigi, sum fyrstu ferð varð boðin út í 2013. Ávíst samstarv um útbúgvingina er fingið í lag við Danmarks Tekniske Universitet (DTU), soleiðis at undirvísingin í støddfrøði við hjálp av m.a. web-tøkni er tann sama, sum DTU bjóðar sínum verkfrøðilesandi.

Náttúruvísindadeildin er í samstarvi við Bergens Universitet, Århus Universitet og Háskóla Íslands við til at bjóða eina felags norðurlendska 2 ára masterútbúgving. Hetta er “The Joint Nordic Master's Programme in Marine Ecosystems and Climate”. Tað er ein altjóða útbúgving fyri lesandi, sum hava sína grundútbúgving innan lívfrøðiliga ella alisfrøðiliga havfrøði, og hava áhuga fyri tvørfakligum havfrøðiligum avbjóðingum.

### *Gransking*

Granskingin á Náttúruvísindadeildini verður framd innan mýlska lívfrøði, populatiónsgenetikk, vistfrøði, biotøkni, aldu- og streymviðurskifti við Føroyar,

umhvørvisdálking, støddfrøði og kunningar- og samskiftistøkni. Í 2013 vórðu fyrireikingar gjørdar til at menna gransking við atliti at vindorku.

Granskingin á Náttúruvísindadeildini er fíggjað av Setrinum og øðrum almennum og/ella privatum veitarum. Við granskingini verður nýggj vitan í náttúruvísindum, tøknifrøði og støddfrøði framleidd og miðlað.

Gransking er nýggjur partur av arbeiðinum á Sjúkrarøktarfrøðideildini. Higartil hevur granskingin verið innan sjúkrarøktarfrøði við denti m.a. á fyribrigdi í smásamfeløgum. Í 2013 vórðu fyrireikingar gjørdar til eisini at menna gransking í heilsuvísindum, ið fevna um onnur øki enn sjúkrarøktarfrøði. Miðað verður eftir at fáa gongd á nýggj øki í 2014.

### *Samstarv*

Í mai 2013 varð leiguavtala undirskrivað millum Fróðskaparsetrið og granskingarsetrið iNOVA um hýsing av starvstovugransking hjá Fróðskaparsetrinum. Náttúruvísindadeildin hevur flutt framkomna starvsstovuútgerð og meginpartin av síni starvsstovugransking inn í iNOVA. Aðrir granskingarstovnar umhugsa eisini at leiga seg inn í iNOVA, og væntað verður, at hetta fer at økja um samstarvsmøguleikarnar millum granskingarstovnar og millum granskingarstovnar og vinnulív.

### *Centre of Excellence*

Arbeiðið hjá Náttúruvísindadeildini í Nordic Centre of Excellence við heitinum “Study of climate change effects on marine ecosystems and resource economics” helt áfram í 2013. Hetta er eitt 5 ára verkætlanarsamstarv millum tíggju norðurlendsk universitet og aðrar granskingarstovnar, sum byrjaði í 2011. Ph.d. verkætlanin á Náttúruvísindadeildini við heitinum: “Spatial distribution of cod on the Faroe Plateau in relation to climate and other environmental conditions“ er ein av 16 ph.d. verkætlanum, sum eru í samstarvinum.

# Útbúgvingar og lesandi

## *Útbúgvingar*

Í talvuni niðanfyri síggjast útbúgvingarnar, sum vórðu bodnar út í 2013. Allar útbúgvingarnar eru skipaðar eftir altjóða leisti og geva atgongd til víðari lestur uttanlands.

Talva 1: Yvirlit yvir útbúgvingar bodnar út á Fróðskaparsetrinum í 2013 (bachelor, master og hjánám)

| | | |
|---|---|---|
| Lærara | B.Ed. | 4 ára nám – starvsvenjing er partur av lestrinum |
| Námsfrøði | B.Ed. | |
| Sjúkrarøktarfrøði | B.Sc.Cur. | |
| Søga | B.A. | 3 ára nám við samlestri fyrsta árið |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging | B.S.Sc. | |
| Politikkur og umsiting | B.S.Sc. | |
| Mál og bókmentir | B.A., M.A., hjánám | Undirvísing í føroyskum máli og bókmentum á øllum stigum |
| Orku- og umhvørvisverkfrøði | B.Sc. | 3 ára nám |
| Vegleiðing | M.A. | 2 ára nám, skipað sum parttíðarlestur |
| Løgfrøði | M.A. | 2 ára nám |

Kelda: Próvbókin, Fróðskaparsetur Føroya.

Afturat fulltíðarútbúgvingunum er nógv annað útbúgvingarvirksemi á Setrinum. Á skeiðum, sum ikki eru fullsett, kunnu fólk, sum hava neyðugu fortreytirnar, tekna seg sum stakgreinalesandi.

Altjóða summarskeið í føroyskum var í august mánaði. Setrið bjóðar eisini á hvørjum ári onnur skeið, eitt nú Cambridgeskeið í enskum og próvskeið í føroyskum.

## *Lesandi 2013*

Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu tey lesandi á Fróðskaparsetrinum eru býtt á útbúgvingar. Nógv flest lesandi eru á NÁD, ið hvørt ár tekur inn stórar árgangir á báðum útbúgvingunum. Eisini SFD tekur eitt støðugt høgt tal av nýggjum lesandi inn á hvørjum ári. Talvan vísir, at fleiri aðrar útbúgvingar eisini eru vælumtóktar og draga at sær nógv lesandi.

Talið av lesandi á Fróðskaparsetrinum er støðugt vaksið seinastu árini. Í 2012 varð nýtt met sett, tá í alt 573 fólk vóru undir lestri á Fróðskaparsetrinum. Í 2013 er talið vaksið við 105 lesandi, og er samlaða talið av lesandi 678.

Av teimum lesandi á Fróðskaparsetrinum eru meira enn tveir triðingar kvinnur. Tað eru serliga útbúgvingarnar á NÁD og á SFD, ið hava nógv kvinnulig lesandi. Á NVD er meirilutin av teimum lesandi menn, ímeðan kynsbýti ímillum lesandi á SFD og á FMD er javnari.

Talva 2: Yvirlit yvir øll lesandi á Fróðskaparsetrinum í 2013, býtt á útbúgvingar

| **Útbúgvingar** | **Stytt heiti** | **Tal av lesandi** |
|---|---|---|
| Lærari | B.Ed. | 156 |
| Námsfrøði | B.Ed. | 137 |
| Mál og bókmentir | B.A. | 45 |
| Mál og bókmentir | M.A. | 8 |
| Søga | B.A. | 40 |
| Politikkur og umsiting | B.S.Sc. | 20 |
| Sosialvísindi og samfelagsplanlegging | B.S.Sc. | 28 |
| Samfelagsvísindi | B.S.Sc. | 36 |
| Lívfrøði | B.Sc. | 6 |
| KT-verkfrøði | B.Sc. | 36 |
| Jarð- og Havfrøði | B.Sc. | 1 |
| Sjúkrarøktarfrøði | B.Sc.Cur. | 87 |
| Orka og umhvørvisverkfrøði | B.Sc. | 18 |
| Vegleiðing | M.A. | 36 |
| Almannafyrisiting | Diplom | 2 |
| Løgfrøði | M.A. | 22 |
| **Lesandi tilsamans** | | **678** |

Kelda: Fróðskaparsetur Føroya, Próvbókin 10. oktober, 2013.

Harumframt eru 15 ph.d. lesandi, sum antin lesa ph.d. lestur á Setrinum ella hava tilknýti til Setrið. Trý taka masterútbúgving innan lívfrøði, søgu og stjórnmálafrøði. Fýra lesa hjánám innan mál og bókmentir og søgu.

Aftrat hesum taka 30 ískoytisútbúgving innan fólkaskúlalærara, námsfrøði ella sjúkrarøkt.

# Fíggjarviðurskifti

Talva 3: Roknskapur fyri Fróðskaparsetrið 2013.

| Inntøkur | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|
| Rakstrarjáttan frá løgtinginum | 67.252.000 | 68.797.000 | 68.047.000 | 65.498.000 |
| Sølu inntøkur v.m. | 1.371.056 | 1.229.922 | 1.248.239 | 2.779.373 |
| Flytingar inntøkur millum almennar stovnar | 1.391.009 | 673.736 | 1.439.674 | 1.353.882 |
| Flytingar inntøkur frá kommunum | 1.906.405 | 1.746.713 | 1.639.594 | 1.580.286 |
| **Inntøkur til samans** | **71.920.470** | **72.447.371** | **72.374.507** | **71.211.541** |
| **Lønarútreiðslur til starvsfólk** | | | | |
| Mánaðarlønir | 43.642.019 | 42.678.548 | 41.095.839 | 40.554.966 |
| Tímalønir | 4.185.911 | 3.805.232 | 2.869.909 | 2.651.960 |
| Samsýningar v.m. | 2.176.320 | 2.462.148 | 2.303.527 | 3.247.859 |
| Eftirlønir og abm-gjøld | 8.098.684 | 7.946.421 | 7.279.618 | 7.271.213 |
| Endurgjald fyri lønir | -1.232.203 | -48.651 | 616.975 | -566.551 |
| **Lønarútreiðslur tilsamans** | **56.870.731** | **56.843.698** | **54.165.868** | **53.159.447** |
| **Húsaleiga v.m.** | | | | |
| Húsaleiga og viðlíkahald | 2.443.300 | 2.471.839 | 2.394.371 | 2.290.067 |
| El | 858.652 | 813.838 | 899.660 | 761.385 |
| Olja | 1.371.280 | 1.657.057 | 1.365.058 | 1.246.134 |
| **Húsaleiga v.m. tilsamans** | **4.673.232** | **4.942.734** | **4.659.089** | **4.297.586** |
| **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | | | |
| Skrivstovuhald v.m. | 6.773.611 | 6.316.293 | 7.466.562 | 7.203.652 |
| Umboðan | 610.928 | 722.096 | 507.698 | 431.657 |
| Ferðing og flutningur v.m. | 1.425.646 | 1.708.627 | 2.005.456 | 1.639.370 |
| Keyp av útbúnaði | 1.120.957 | 1.403.422 | 2.586.030 | 3.233.561 |
| Stuðul | 295.395 | 176.397 | 141.000 | 389.000 |
| Aðrar rakstar útreiðslur | 80.401 | 52.308 | 581.500 | 724.067 |
| **Aðrar rakstrar útreiðslur tilsamans** | **10.306.938** | **10.379.143** | **13.288.246** | **13.621.307** |
| **Útreiðslur tilsamans** | **71.850.901** | **72.165.575** | **72.113.203** | **71.078.340** |
| **Ársúrslit** | **69.569** | **281.796** | **261.304** | **133.201** |

Kelda: Fíggjardeildin, Fróðskaparsetur Føroya.

# Leiðsla og stýri

## *Leiðsla*

- Sigurð í Jákupsstovu, rektari, cand.polyt., ph.d.
- Hans Pauli Joensen, dekanur á Megindeildini fyri náttúruvísindi og heilsuvísindi, cand.scient og lektari
- Malan Marnersdóttir, dekanur á Megindeildini fyri hugvísindi, samfelagsvísindi og námsvísindi, cand.mag, dr.phil, professari í bókmentum
- Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri, cand.mag.

## *Stýrið við ársenda 2013*

- Herálvur Joensen, stýrisformaður, stjóri í Føroya Reiðarafelag
- Jan Mortensen, næstformaður, privatkundastjóri á Føroya Tele
- Juanna Schröter Joensen, lektari við lærda háskúlan í Stockholm
- Tove Bull, professari í málfrøði við lærda háskúlan í Tromsø
- Gestur Hovgaard, starvsfólkaumboð, lektari á Søgu og Samfelagsdeildini
- Sára Joensen, starvsfólkaumboð, skrivari á Føroyamálsdeildini
- Vibeke Michaelsdóttir, lesandi á Námsvísindadeildini

# Vísindaligar útgávur

## Javnlíkamettar (Peer reviewed)

Vísindaligar bøkur og javnlíkarmettar greinir í tíðarritum og bókum:

1. **Christiansen, Ó.**, Scott, H. & Sørensen, S. E. (2013). A Partial Application of Classic Grounded Theory in a Study of Poverty in Greenland. *The Grounded Theory Review,* 12 (2), pp. 15-22. http://groundedtheoryreview.com/wp-content/uploads/2013/12/FinalF-Poverty-in-G-12212013-1.pdf

2. Eilers, S., **Restorff, G**. & Ruiz, E. (2013). Classifying C*-algebras with both finite and infinite subquotients. *Journal of Functional Analysis* **265** (3), pp. 449-468. DOI: 10.1016/j.jfa.2013.05.006

3. Eilers, S., **Restorff, G.**, Ruiz, E. (2013). Classification of graph C*-algebras with no more than four primitive ideals. In Carlsen, T.M., Eilers, S., Restorff, G., Silvestrov, S. (Eds.), *Springer Proceedings in Mathematics & Statistics: Operator Algebra and Dynamics* (Vol. 58). Nordforsk Network Closing Conference, Faroe Islands, May 2012.

4. Eythórsson, G. & **Hovgaard, G.** (2013). Vestnorden. A functional region? *Icelandic Review of Politics & Administration* (Stjórnmál & Stjórnsýsla), vol. 1, (pp. 34-56). Institute of Public Administration and Politics, Faculty of Political Science, University of Iceland.

5. Feng W., Liu J., Cao J., Yang L., **Xin, Q**. (2013). Interference-aware cooperative QoS routing in multi-hop wireless networks. *Computers & Electrical Engineering*, 39 (6), pp. 1650-1666.

6. **Gaini, F**. (2013). *Lessons of Islands. Place and Identity in the Faroe Islands.* Pp. 1-80. Tórshavn: Fróðskapur (Faroe University Press)

7. **Guttesen, R.** (2013). Differences between tithe accounts and the material reality behind them – the case of the Faeroe Islands. Munir millum tíggjundaroknskapir og materiella realitetin aftanfyri. Lýst við dømum úr Føroyum. *Fróðskaparrit* (60), pp. 83-95. Tórshavn: Fróðskapur (Faroe University Press).

8. **Hammer, K.** (2013). Hope pictured in drawing by women newly diagnosed with gynaecological cancer. *Cancer Nursing* 36 (4), pp. 42-50. DOI: 10.1097ncc.0b01e31826c7af2

9. **Hansen, B. D.** (2013). Heimloysi sum tekstslag. Yrkis- ella fagurbókmentir - ella hvat? Spurningurin um tekstslag í ritverkinum eftir K.O. Viderø við útgávuni *Á Suðurlandið* (1990) sum dømi/Non-fiction, fiction – or what. A discussion of genre in the writings of K.O. Viderø. *Fróðskaparrit 60,* pp. 53 - 72. Tórshavn: Fróðskapur.

10. Heycock, C., Sorace, A., **Hansen, Z. S.** & Wilson, F. (2013). Acquisition in Variation (and Vice Versa): V-to-T in Faroese Children. *Language Acquisition* (20) 1, pp. 5-22. London: Routledge.

11. **Jacobsen, J. í L.** (2013). *Málmaðurin í útvarpinum 3. Veturin 2010-2011. Og so nøkur hornaspørk* (197 síður). Vestmanna: Sprotin.

12. **Jacobsen, J. í L.** (2013). Navnapurisma. Í Z. S. Hansen, J. í L. Jacobsen, T. K. Jakobsen, K. Magnusen & T. Sigurðardóttir (ritstj.) *Frá Sturlungu til West Venture. Heiðursrit til Anfinn Johansen á 60 ára degnum*, (pp. 120-130). Tórshavn: Fróðskapur.

13. **Jakobsen, T. K., Magnussen, K., Johansen, A. og Weyhe, E.** (eds.)(2013). Nøvn í *strandamentanini*/Navne i kystkulturen. Forelæsninger fra det 41. NORNA-symposium i Tórshavn 2.-4. juni 2011. *NORNA-Rapport* 89. Uppsala: NORNA-förlaget.

14. **Marnersdóttir, M.** (2013). La littérature et la religion vues à travers la réception de l'œuvre de l'auteur féroïen William Heinesen." *Deshima*. *Revue d'histoire globale des pays du nord.* No 7: Protestantisme en Europe du Nord aux XXe et XXIe siècles. Départements d'études néerlandaises et scandinaves. Strasbourg - Université de Strasbourg.

15. **Petersen, H. P.** (2013). *Ávum* i færøsk og *áfu* i norrønt. *Íslenskt mál* 35: 155-160. Reykjavík: Íslendska Málfræðifélagið.

16. **Petersen, H. P.** (2013). Vera og hava + høvuðssagnorð. Ein fyribilskanning. Í Z. S. Hansen, J. í L. Jacobsen, T. K. Jakobsen, K. Magnussen og T. Sigurðardóttir (ritstj.) *Frá Sturlungu til West Venture. Heiðursrit til Anfinn Johansen á 60 ára degnum,* (pp. 195-206). Tórshavn: Fróðskapur.

17. **Rógvi, K. á**, (2013). *West-Nordic Constitutional Judicial Review A Comparative Study of Scandinavian Judicial Review and Judicial Reasoning (reedited, improved).* Monograph. DJØF Publishing

*18.* **Rógvi, K. á**, (2013). *Felagsverklóg, fyribils útgáva. Text book on Faroese collective labour law.* Monograph, text book. Tórshavn: Fróðskaparsetur Føroya

19. **Rógvi, K. á**, (2013). *Faroese Governance.* Chapter 13, Polar Law Textbook II. Chapter in text book. Nordic Council of Ministers.

20. **Rógvi, K. á & Larsen, B.** (2013). Dansk rets udfyldende karakter på Færøerne – Danish law in Faroese law. *Ugeskrift for Retsvæsen*, nr. 4, pp. 25-34, Karnov Group Denmark A/S, København. UfR.2013B.25

21. **Sigurðardóttir, T.** (2013). Skaldið Jóanes Nielsen. Japanese Contemporary Poetry Magazine/*Gendaishi Techo. Nordic poetry* (3), pp. 122-125. Transl. by Chiaki Kaiho. Tokyo: Sichosha Publishing.

22. **Sigurðardóttir, T.** (2013). Nøvn í føroyskum barnabókum, upprunaligum og týddum. Í Z. S. Hansen, J. í L. Jacobsen, T. K. Jakobsen, K. Magnussen og T. Sigurðardóttir (ritstj.) *Frá*

*Sturlungu til West Venture. Heiðursrit til Anfinn Johansen á 60 ára degnum,* (pp. 207-212). Tórshavn: Fróðskapur.

23. **Sølvará, H. A.** (2013). Uppreistur í Klaksvík – læknasetanin sum elvdi til uppreistur. *Fróðskaparrit 60,* pp. 10-52. Tórshavn: Fróðskapur.

24. **Sølvará, H. A.** (2013). *Frá tilboði til læknastríð – søguvísindalig háttaløg, uppgávur og keldur* (281 síður). Tórshavn: Fróðskapur.

25. **Weyhe, E.** (2013). Skála, Skálabotnur og Skálafjørður. Í Z. S. Hansen, J. í L. Jacobsen, T. K. Jakobsen, K. Magnussen & T. Sigurðardóttir (ritstj.) *Frá Sturlungu til West Venture. Heiðursrit til Anfinn Johansen á 60 ára degnum*, (pp. 278-284). Tórshavn: Fróðskapur.

26. **Weyhe, E**. (2013). Skørðini í Norðradali. *Fróðskaparrit 60*, pp. 73-82. Tórshavn: Fróðskapur.

27. Zhang Z.L., Li Z.B., **Xin Q.**, Hu P., Xiao D.P., He W. (2013). Design and Distortion Analysis of Passive Sensor Probes for the Measurements in Electric Fields. *Sensors & Transducers*, Vol. 22, Special Issue (June), pp. 36-43. The International Frequency Sensor Association Publishing.

28. Zhao B.K., Wu C. and **Xin, Q**. (2013). Special Issue on Advances in Internet Security and Technology. *International Journal of Internet Services and Information Security*, Volume 3, Issue 1/2, pp. 1-4. 137 pages (edited book).

## Ráðstevnur (Conferences)

Framløgur á ráðstevnum eftir at úrtak hevur verið mett og góðkent:

29. **Fjallheim, A. S.** (2013). *Women's experience with postnatal depression in a small-scale society.* International Human Science Research Conference, Aalborg University, Denmark, 13th to 16th of August. Poster presentation.

30. **Gaini F.** & **Olsen, E.** (2013). *The required joy of learning*. NERA 41st Congress, Reykjavík, Iceland, 9th of March.

31. **Haanes, G. G.** (2013). *Skill development for nurses in home care.* Oral presentation at the World Congress of Gerontology and Geriatrics, Seoul, Korea (IAGG). 27th of June. Abstract.

32. **Hammer, K.** (2013). *Considerations and challenges in establishing a Master Education in the Faroe Island*. "Health and Well Being in Arctic Regions", Seminar at the University of Akureyri, Iceland, 30th of April.

33. **Hammer, K.** (2013). *Portraying Hope - A study among women newly diagnosed with gynaecological cancer*. "Verdighet i helsevitenskapene / värdighet i vårdvetenskapen / dignity in caring science". Oslo, Norway, 14th to 16th of Mars.

34. **Hammer, K.** (2013). *Using drawing in qualitative research with adults to explore experiences in health and illness.* "Essentials of Nursing Care. Methods and Studies to Improve the Evidence Base". Radboud University, Nijmegen, the Netherlands, 2nd to 4th of June.

35. **Hovgaard, G.** & Eyþórsson, G. (2013). *The West Nordic region: Possibilities and role in future development in the North-Atlantic*. ESPON conference, Akureyri, 22nd and 23rd of August. http://www.rha.is/enecon/enecon-activities/akureyri-conference-2013/conference-presentations-akureyri-2013

36. **Olsen, E.** (2013). *Týðandi og minni týðandi lærugreinar – ein hugburðskanning*. Frændafundur. Tórshavn, Færøerne, 24. august.

37. **Olsen, E.** & **Poulsen, P.** (2013). *Important but boring – the quest of the missing link of enjoyment*. Poster presentation at NERA 41st Congress, Reykjavík, Iceland, 7nd to 9th of March.

38. **Petersen, H. P.** (2013). *Bilingualism connected to close related languages.* "Rom for språk". Bergen University, Norway, 14th to 16th of Mars. Plenay lecture.

39. **Petersen, H. P.** (2013). *Integrationsbetænkningen, tosproglighed og undervisning for udlændinge*. Alfa-Konference, Tórshavn, Færøerne, 28. oktober.

40. **Petersen, H. P.** (2013). *The Transmission Process and Results in the Faroese - Danish Language Contact Situation*. ICLaVE, Trondheim, Norway, 26th to 28th of June.

41. **Róin, Ása** (2013). *Ageing in the Faroe Islands; the meaning of place*. ESA 11th Conference: Crisis, Critique and change. Torino, Italien, 28th to 31st of August.
In: Abstract book, Organizers: Department of Culture, Politics and Society, (pp. 46-47), University of Turin. ISBN 978-88-97523-49-9. pdf:
http://www.esa11thconference.eu/skins/default/static/ESA_2013_Abstract_Book.pdf

42. **Sigurðardóttir, T.** (2013). *Once upon a time there was no Burger King*. Conference: "Trends and Strategies in Minor Children's Literatur in Times of Global Popular Culture". Stofnum Vigdísar Finnbogadóttur, Reykjavík, Iceland, 24th and 25th of April.

43. **Sølvará, H. A.** (2013). *The Use of referendums in the Faroe Islands*. Conference: "Referendums and the European Democratic Ideal". Blaise Pascal University in Clermont Ferrand, France, 6th and 7th of June.

## Aðrar vísindaligar útgávur (Other scientific publications)

Ritstjórnaðar greinir í øðrum miðlum eitt nú í heiðursritum, fak- og mentatíðarritum, frágreiðingar frá kanningum v.m.:

1. Hansen, S., Albinus, H., Dam, T. & **Christiansen, Ó.** (2013). Búskaparfrágreiðing heystið 2013. *[Economic Report From the Economic Council of the Faroe Islands in the Autumn 2013. With an Executive Summary in English].* Tórshavn: Búskaparráðið (ISBN 978-99918-3-384-2).

2. **Holm, D.** (2013). Fra tanke til handling - forandringer i nordatlantiske samfund. Frágreiðing í smb. við NORA verkætlanina: Communties for Change. NORA: http://www.nora.fo/fileadmin/user_upload/Files_New_nora.fo/Sluttrapporter/Communities_for_Change_-_Final_Report.pdf

3. **Holm, D.** & og Olsen, H. (2013). Fiskastovnar, náttúruviðurskifti og fiskidagar 2013. Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn. *Fiskidaganevndin* (samrøðukanning).

4. **Holm, D**., Mýri, M. H. & Mørkøre, J. (2013). Fiskerisektorens udfordringer i en integreret havforvaltning. Frágreiðing umbiðin av Nordisk Ministerråd. Internet útgáva. Fróðskaparsetur Føroya, Tórshavn.

5. Iosjpe M., Isaksson M., **Joensen H.P.**, Lahtinen J., Logemann K., Pálsson S.E., Roos P., Suolanen, V. (2013). Consequences of severe radioactive releases to Nordic Marine environment. *NKS-B Radioactivity report*: NKS-276, February, electronic report (pp. 1-51). ISBN 978-87-7893-350-8. http://www.iaea.org/inis/collection/NCLCollectionStore/_Public/44/035/44035215.pdf

6. **Joensen, H.,** Gregersen H. (2013). Analysis of nutrients and contaminants in white muscle of Faroese cod and comparisons with corresponding findings in Iceland, Norway, Sweden and Denmark. *NVD-rit* (2013:06), 1-34, University of the Faroe Islands.

7. **Joensen, H.** (2013). Proteins and peptides in the gastrointestinal tract. *NVD-rit* (2013:10), 1-5, University of the Faroe Islands.

8. **Joensen, H.** (2013). Healthy Compounds in Meat and Blubber of Whales and Seals. *NVD-rit* (2013:07), 1-25, University of the Faroe Islands.

9. **Joensen, H.** (2013). Laxalús lúsasex lúsavinna. *NVDrit* (2013:05), 1-14, University of the Faroe Islands.

10. **Magnussen, E.** (2013). Haruveiðan í Føroyum 2012 [*Hunting of hare in the Faroe Islands in 2012*]. *NVDrit* (2013:02), 1-44, University of the Faroe Islands. pdf-file.

11. **Magnussen, E.** (2013). Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank 5-10 September 2013 (in Faroese). [*Túrfrágreiðing: Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka 5-10 september 2013*]. *NVDrit* (2013:12), 1-7, University of the Faroe Islands. pdf-file.

12. **Mikalsen, S.O.**, **Joensen, H.**, Debes, H.H. and **Magnussen, E**. (2013). Uppskot til endurskoðan av BSc-útbúgvingini í lívfrøði á Fróðskaparsetri Føroya. [*Proposal for a revision of the BSc-program in Biology at the University of the Faroe Islands*]. *NVDrit* (2013:13), 1-59, University of the Faroe Islands. pdf-file.

13. **Olsen, E.** (2013). Samfelagið undir moldum ger av, hvat livir oman jarðar. *Frøði* (2): 10-11. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag.

14. **Olsen, E**. (2013). Tað SKAL vera stuttligt at læra. *Frøði* (1): 10-13. Tórshavn: Føroya Fróðskaparfelag.

15. **Sigurðardóttir, T.** (2013). Bárður Oskarsson sum barnasøguteknari. Í Niels Ort (ritstj.): *Bárður Oskarsson – lættleiki og líðing,* pp. 43-52. Tórshavn: Listasavn Føroya.

16. **Sigurðardóttir, T.** (2013). Færøsk litteratur i Norge. *Litteraturtidsskriftet Lasso* (1), pp. 45-49. Oslo: Students' literary magazine.

17. **Sigurðardóttir, T.** (2013). Materiens spiritualitet. Den visuelle diktaren og diktande bildeskaparen Tóroddur Poulsen. *Tjørebredd sommarfugl*, pp. 123-127. Týtt til norskt.: Lars Moa. Tromsø: MargsMarginale.

## Ritstjórnararbeiði

18. Carlsen, T.M., Eilers, S., **Restorff, G.**, Silvestrov, S. (eds.) (2013). *Operator Algebra and Dynamics*. Nordforsk Network Closing Conference, Faroe Islands in May 2012, Springer Proceedings in Mathematics & Statistics, Vol. 58. New York, Dordrecht, London: Springer Heildelberg.

19. **Hansen, Z. S.**, **Jacobsen, J. í L.**, **Jakobsen, T. K.**, **Magnussen, K**. & **Sigurðardóttir, T** (ritstj.) (2013). *Frá Sturlungu til West Venture. Heiðursrit til Anfinn Johansen á 60 ára degnum*. Tórshavn: Fróðskapur.

20. **Sigurðardóttir, T.** (ritstj.) (2013). *Nýggj leiti – seks greinar um føroyskar barnabøkur 2003-2009.* Vestmanna: Sprotin.

21. **Sigurðardóttir, T.** (ritstj.) (2013). *Streingir, ið tóna VIII.* Ritverk Símunar av Skarði. Ískoytis- og yvirlitsbind. Tórshavn: Fannir.

22. **Weyhe, E., Jakobsen, T. K., Magnussen, K. & Johansen, A.** (ritstj.) (2013). *Nøvn í strandamentanini / Navne i kystkulturen*. Forelæsninger fra det 41. NORNA-symposium i Tórshavn 2.-4. juni 2011. NORNA-rapporter 89. Uppsala.

## Fyriskipan

23. **Hovgaard, G.** (2013). Skipað seminar við heitinum: "Samfelagsbroytingar í 1800-talinum", Søgu- og samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya, Tórshavn, 4. november.

24. **Sølvará, H. A., Sigurðardóttir, T., Marnersdóttir, M., Reinert, L. & Johansen, A.** (2013). Skipað Frændafund 8, føroysk-íslendsk ráðstevna við heitinum: "Filmur og móðurmál". Fróðskaparsetur Føroya, Tórshavn, 24.-25. august.

# Ph.d. verkætlanir

| Heiti á verkætlan | Lesandi | Høvuðsvegleiðari |
|---|---|---|
| The effects of climate and ocean currents on Faroe saithe | Eydna í Homrum | Bogi Hansen, adjung. professari |
| Vatngóðska innan aling á sjónum | Heini Winthereig Rasmussen | Knud Simonsen, lektari |
| Føroysk gøtunøvn – ein partur av føroysku staðarnøvnunum | Kristin Marjun Magnussen | Eivind Weyhe |
| Proteoglycans (PGs), glycosaminoglycans (GAGs) and collagen in the connective tissue of fish muscle | Ása Jacobsen | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| Bioactive peptides - extraction and processing methods for marine secondary | Durita Dahl Djurhuus | Svein-Ole Mikalsen, professari |
| Spatial distribution of cod on the Faroe Plateau in relation to climate and other environmental conditions | Katharina Maj Ottesen | Eyðfinn Magnussen, lektari |
| Time and Energy Efficient Communication in Wireless Sensor Networks | Guoqiang (Richard) Liu | Xin Qin, lektari |
| Processing and geologic interpretation of reflection-seismic data from the Glyvursnes-Vestmanna seismic tie | Hilmar Simonsen | Jim Brown, professari |
| Marine Climate Effects on Primary Production around the Faroe Islands | Sólvá Káradóttir Eliasen | Karin Margreta Húsgarð Larsen, Havstovan |
| Heima er ikki til - ferðafrásagnir K. O. Viderøs | Bergur D. Hansen | Malan Marnersdóttir |
| Máltøka hjá føroyskum børnum | Sissal Rasmussen | Dorthe Bleses, Syddansk Universitet |
| Leaving the islands: Understanding Women´s Migration from the Faroe Islands | Karin Johanna Knudsen | Jørgen Ole Bærenholdt, RUC og Malan Marnersdóttir |
| Málslig menning og lesimenning/undirvísing hjá føroyskum børnum | Karolina Matras | Niels Egelund, Lund University |
| Ageing in the Faroe Islands. The construction of old age and the experience of ageing | Ása Róin | Catharina Nord og Elisabet Cedersund, Linkoping University |
| Identification of postnatal depressions in a small-scale society – A mixed method investigation of the validity of the Edinburgh Postnatal Depression Scale as a national screening instrument for postnatal depressions in the Faroe Islands | Anna Sofía Fjallheim | Kristianna Hammer, lektari |